**FISKIVINNUTÍÐINDI**

## ILA-virusið gamalt

Í hesum nógva tosinum um ILA og aling, kann ein fáa ta fatan, at alingin er upphavið til ILA, men so er ikki. Við at kanna ILA-virus úr Canada og Europa kunnu granskarar staðfesta felags upphav, ið er eldri enn 100 ár. Upprunin til virussið hevur einki við aling at gera, og er virussið allarhest flutt ímillum kontinentini fyri mairai enn 100 árum síðani.

Tað áhugaverda í hesum er, at í tíðini eftir 1870 varð nakað av rognum flutt aftur og fram ímillum Europa og Norðuramerika, og kann hesin flutningur vera upprunin til ILA. Virussið hevur leingið verið til, og er staðfest í fiski fyri nógvum árum síðani.

Men virussið spjæðist lættari tá nógvur fiskur er samlaður, og er tað tí vorðið sjónligari innan aling av fiski. Granskarar meina, at villur fiskur kann hava ILA, hóast tað ikki er staðfest. Tað er torførari at finna ein deyðan villan fisk enn ein deyðan aldan fisk í eini alinót !

Í flestu londum í Europa er ikki loyvt at vaccinera ímóti ILA, hóast tað finnast fleiri vaccinur, ið hava verið royndar við góðum úrslitum.
Orsøkin er tann, at í EU verður ILA roknað sum ein fyrsta floks virus, og tí verður vaccinering ikki loyvd. Tann dagin tá EU niðurklassar ILA í annan flokk, verður loyvt at vaccinera fisk ímóti ILA, og tað fer helst ikki at ganga long tíð til tað hendir, meina granskarar innan heilivágsídnaðin.

Staðfestingin av ILA innan alivinnuna hevur ført við sær, at nógv viðurskifti innan aling eru vorðin broytt og betrað, og tað er at fegnast um, hóast ILA enn rakar fleiri alibrúk. Granskarar meina ikki at ILA kann ruddast út, men vinnan hevur prógvað, at hon kann hava tamarhald á sjúkuni í ein vissan mun, m.a. við betraðum mannagongdum í brúkunum.

ILA er nakað, vinnan má liva við, og liva væl við, serliga tann dag, tað verður loyvt at vaccinera, siga granskarar innan heilivágsídnaðin til Intrafish, haðani innihaldið til hendan stubba er komið.

# Bert tríggir laksar høvdu ILA



Alibrúkið á Funningsfirði, har ILA sjúkan er staðfest

Nú eru endaligu úrslitini komin av royndunum sum vóru sendar til djóralæknastovnin í Oslo av laksi, sum var undir illgruna fyri at vera smittaður við herviliga fiskasjúkuni ILS. Av teimum 15 fiskunum, sum vóru sendir til Noregs varð staðfest við vissu, at tríggir vóru smittaðir við ILS sjúkunu. Nakrir aðrir fiskar vístu eisini sjúkutekin, sum kunnu stava frá ILA.

Farið er nú undir at taka fiskin úr ringinum á Funningsfirði, har ILA smittan er staðfest. Allur fiskurin skal takast úr hesum ringinum fyrst og síðan verður farið undir at taka fiskin úr hinum ringunum á fjørðunum.

Ætlanin er so, at teir tríggir firðirnir, Fuglafjørður, Oyndarfjørður og Funningsfjørður skulu liggja brak í eina tíð, fyri at basa sjúkuni endaliga.

Landfsdjóralæknin fer nú at taka royndir av øllum alibrúkum í landinum fyri at vita, um ILA sjúkan er at finna aðra staðni í landinum .



*Hetta er annað alibrúki á Funningsfirði og her er ongin ILA sjúka staðfest enn.*
Mynd Jens Kr. Vang

## Føroyingar og russar landa svartkjaft

Seinstu tíðina hava trý útlendsk svartkjaftaskip landað svartkjaft á Eystfirðum í Íslandi. Tey eru Norðborg, Tróndur í Gøtu og russiska systurskipið hjá Christina í Grótinum, Murman 2.

Murman 2 landaði 1830 tons á Fáskrúðsfirði, Tróndur í Gøtu 2650 tons á sama stað og Norðborg landaði góð 1830 tons á Eskifirði.

íslendski fiskamjølsverksmiðjurnar hava higartil í ár tikið móti 14.600 tonsum af svartkjafti, harav hevur Hólmaborg landað 2260 tons.

## Nógvur útróður á Ólafsvík

Nú meðan fiskimannaverkfallið er í hæddini í Íslandi, rógva ikki færri enn fimmti smábátar og dekksbátar út av Ólafsvík, skrivar íslendska vevsíðan Interseafood.com.

Bátarnir hava fingið væl. Teir hava kastað nót eftir seiði og eisini hava teir fingið væl av toski á línu og við snellu. Ólafsvík er næststørsta útróðrarpláss í Íslandi.

# Útflutningurin økist

**Í fjør vórðu vørur útfluttar úr Føroyum fyri 3,75 milliardir krónur, og tað er ein munandi vøkstur samanborið við tey bæði árini frammanundan**



*Størsti parturin av útflutningi Føroyar var fryst og ísað fiskaflak, sum tilsamans varð selt fyri 1,2 milliardir*

ÚTFLUTNINGUR
*Stefan í Skorini*

Útflutingurin úr Føroyum er øktur munandi síðan 1998, at vit veruliga kunnu fara at tosa um góðar tíðir í Føroyum. Hetta stendur at lesa í Hagtíðindum, sum Hagstova Føroya gevur út.

Í 1998 var útflutningurin 2,93 milliardir krónur, meðan hann í 1999 var 3,26 milliardir krónur. Í ár 2000 útflutti føroyska vinnulívið fyri 3,75 milliardir.

Frá 1999 til 2000 var vøksturin í útflutninginum 15%, meðan vøksturin var 12% árini frammanundan.

Útflutningurin av skipum hevur ofta sera stóra ávirkan á hagtølini fyri útflutning. Men eisini tá útflutningurin verður roknaður uttan at skipini eru tald við, er gongdin tann sama. Í fjør var útflutningurin 3,5 milliardir krónur, tá skip ikki eru tald við, og tað er ikki tann stóra broytingin hini bæði árini, tá skipini eru drigin frá.

**Mest fiskaflak**
Sambært hagtølunum kemur størsti parturin av útflutningsvirðinum frá søluni av frystum og ísaðum fiskaflaki. Fiskaflak úr Føroyum varð selt uttanlands fyri 1,2 milliardir krónur í fjør, og hetta er ein vøkstur uppá 19% frá 1999. Henda sølan er ein lítil triðingur av øllum útflutninginum. Útflutt var fyri 345 milliónir krónur av toskaflaki, 237 milliónir av hýsuflaki og 218 milliónir av upsaflaki.

Útflutningur Føroya er at kalla bara fiskaframleiðsla. Útflutningurin av ísaðum og frystum fiski gav 479 milliónir, útflutningurin av saltfiski gav 545 milliónir og útflutningurin av laksi og síli gav 667 milliónir krónur.



